# Kjak



Sjúrður Skaale

## Politisk Hov'sa loysn fellur skeivan mann

*Teir politikarar, sum sendu eina torpedo inn í arbeiðið at byggja miðnámsskúla í Vági, áttu alment at biðið um umbering*

Víst hevði Landsverk ábyrgdina av byggingini í Hovi. Víst hevði Oyvindur Brimnes ábyrgdina av Landsverki. Kanska er tað uppá sítt pláss at geva honum fótin.

Men hvørki Landsverk ella tess stjóri høvdu ábyrgdina av, at ein torpedo brádliga var send inn í arbeiðið at byggja Miðnámsskúla í Vági.

Hvørki Landsverk ella tess stjóri høvdu ábyrgdina av politisku ordrunum um, at ein annar skúli - í ein hundans fart - skuldi klamsast upp í Hovi í staðin.

Hvørki Landsverk ella tess stjóri høvdu ábyrgdina av, at hesin skúli gjørdist so vitleysa dýrur, sum hann gjørdist.

Ábyrgdina av hesum hava teir politikarar, sum settu primitivt, partapolitiskt agg og klandur fram um vit og skil. Sum løgdu vertin á alt annað, tí teir hildu seg kunnað skora nøkur partapolitisk stig.

Eru hesir politikarar nevndir, eru teir kendir.

Teir kunnu ikki setast frá fyri sína gerð.

Men teir áttu at staðið alment fram og biðið Føroya fólk - og serliga suðuroyingar - um umbering.

Kristin Rasmussen

## Heimsins bestu sjómenn?

So var aftur eldur í einum føroyskum skipi, og heimspressan fylgir væl við. Tíðindini eru á breddanum í øllum bløðum, ja enntá í Himmalayan Express.

Hvussu kunnu vit føroyingar rokna við at verða tiknir fyri fult á henda hátt? Hvussu kunnu reiðarar kenna seg tryggar og kenna seg væl at reka sjóvinnu undir sovorðnum umstøðum? Og hvussu kann føroyski sjómaðurin føla seg tryggan? Men man kann bara seta filippinarar umborð í staðin?

Vit hava onga nýggja kunngerð um sjúkraviðgerð umborð á skipum. Eri sjálvur gubbi at einum sjómanni, sum hevur mist føliløsi í einum stórum parti av hondini av hesi grund.

Vit hava onga ISM skipan fyri fiskiskip, ið kundi verið viðvirkandi til, at sonur Jákup Vestergaard ikki misti førleikan í aðrari hondini.

Vit hava eina óbrúkiliga bjargingartyrluskipan, sum óivað hevur kostað í hvussu so er einum manni lívið.

Vit hava onga lóg um arbeiðstrygd umborð á skipum, sum onnur lond hava.

Okkara flagg er á gráa lista. »Athena«, sum eldur nú aftur var í, hevur ein bjargingar- og evakueringsplan umborð, ið ikki er góðkendur, »Approved«, men »Viewed« av Det norske Veritas. Er einki skil á, hvussu klassafeløgini skulu sýna føroysku skipini? Er tað tí, vit eru á gráa lista?

Eg eri lærari á Vinnuháskúlanum. Vit læra næmingarnar um trygd, bæði persónliga, umhvørvisliga og tekniska, um ISM, arbeiðsplássmetingar (váðametingar) og mannagongdir á arbeiðsplássinum. Vit hava teir á langum skeiði í sjúkraviðgerð. Alt hetta, tí vit hava eina líkastillingsavtalu við Danmark um okkara næmingar. Umborð á donskum og norskum skipum fáa teir brúk fyri hesum, men umborð á føroyskum er einki krav til nakað sum helst. Jú, farmaskipini hava ISM (International Safety Management Code), men fiskiskipini hava einki. Bara tað, at ymisk krøv eru til fiskiskip og farmaskip, er ein bági fyri vinnuna, tí ónollur frá fiskiførunum smitta yvir á farmaskipini.

Nær fer broyting at koma í?



Dávid Isfeld
*Hósvík*

## Vit handa dønum føroyskt arbeiði

**Tey mest sjónligu arbeiðsátøk í hesum døgum, eru átøk fyri donsk byggivirki**

Tað verður arbeitt fyri fiskivinnuna við slíkum ágrýtni, at vit mest sum oyðileggja okkara umdømi úti í heim – sum um okkara umdømi hevði tørv á hjálp á hasum økinum við teimum áhaldandi grinda-gølunum. Tað sindri av umdømi vit hava í altjóða heiminum er mest sum í skeljasorði, tí vit fyrilitarleyst gera, sum okkum lystir. Men tá vit skulu bjóða út almenna bygging, so mugu vit vísa fyrilit fyri bæði hesum og hasum; eisini um tað inniber at diskvalifisera okkara egnu virkir.

Hví eru vit líka glað við útheimin, tá tað snýr seg um virksemi á havinum, og líka glað við okkara egnu virkir, tá tað snýr seg um virksemi á landi. Tað er lætt at kalla fiskivinnuna okkara berandi vinnu, tá politikarar arbeiða sum úlvur á skóg fyri hesa vinnu, samstundis sum hon fær stuðul; meðan byggivinnan verður burturluta teimum við bestu royndum og tøkni í grannalondunum – í nýggjastu dømum, til danir.

### Skúlamiðdepilin

Miðnámsdepilin við Marknagili varð handaður dønum, tí krøv vóru til kapasitet, ið ikki er til staðar í Føroyum; tó sluppu Fuglark, Martin E. Leo Sp/f, KJ Elráð og Sámal Johannesen "allernádiskt" upp í part, fyri at henda metstóra byggiætlan skuldi sleppa undan ov nógvum atfinningum. Eg veit, at áðurnevndu føroysku virkini duga síni ting, men tað líkist ov nógv einum alibii fyri, at eitt danskt virki hevur høvuðsábyrgdina og høvuðsávirkanina á útsjónd v.m.

### Flogvallarbygningar

Her vóru krøv sett um royndir í at gera flogvallarbygningar, sum einki føroyskt virki hevur royndir í, sjálsagt. Her átti at verið nóg mikið við royndum og førleika innan bygging av stórum bygningum. So kundi eitt krav verið, at viðkomandi virki skal samstarva við virki við neyðugum royndum; ella seta fólk í starv, ella leiða tey, ið hava hesar royndir, og sostatt fylgja ásettum krøvum til bygging av flogvallarbygningunum.

### O.s.fr.

Á Landssjúkrahúsinum sóu vit fyri tað mesta íslendingar ganga og arbeiða har. Og MT Højgaard mundi farið avstað við arbeiðinum at gera røktarheim Yviri við Strond (vit hava sæð handverksligu dygdirnar hjá MT-Højgaard í Hovi). Tað tykist bara at vera soleiðis, at um byggingin er nóg stór, so fer arbeiðsligi ágóðin av landinum (og skattapengar eisini?). Hetta ger eisini, at tað er trupult at fáa læruppláss hjá handverkarum. Eitt byggipláss sum t.d. Miðnámsdepilin við Marknagili kundi skapt eini 50 læruppláss til elektrikarar, timburmenn, snikkarar, rør- og blikksmiðir v.m., sum høvdu klára at verið útlærdir upp á tað tíðina tað tekur at byggja henda megnar skúladepil. Og ikki minst okkara servitan á økinum stendur við sviðisoð, tá okkara glæsiligastu byggiverkætlanir vera handagar útlendingum. Arkitektar, verkfrøðingar, byggifrøðingar v.m. hava lítið og einki at koma heim til, annað enn set- og raðhúsabygging og umvæling.

Hetta mugu okkara politikarar hugsa um, tá tað almenna byggir. Vit mugu ikki handa alt vitanararbeiði av landinum. Ella mugu tey, ið starvast í byggivinnuni eisini fáa 15 % í skattalætta og hava rættindi til minstuløn, og so eru vit minst effektiva tjóðin í heiminum – á landi eins og á sjógvi.